

Johan Norðfoss:

# 14 ár og nú skal arbeiðast

**Í fyrsta parti greiddi Johan frá sínum barnaárum í Havn. Nú er hann 14 ára gamal, og nú skal arbeiðast. Tað, sum hann forvinnur, fer til húsið. Fyrsta rættuliga arbeiði hansara er at arbeiði í handli**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Mær dámdi væl at arbeiða, so eg var javnan ørindadrongur, tá ið eg hevði frí frá skúlanum.

Eitt arbeiði, eg eisini plagdi at hava, var at seta biografplakatir upp fyri Dia í Bø. Lønin fyri hetta var ein barnabillett. Hevði ein uppspart tvær barnabillettir, kundu tær býtast um við eina vaksnamannabillett.

Onkuntíð var eg hjá Jacob Lützen á Áarvegnum. Lønin var 10 kr um vikuna. Eg var hjá Otto Bech, sum hevði kjøthandil. Eg var eisini hjá Poul Restorff, sum sonur hansara Andrias rak tá. Hetta var serliga, tá ið nógv var at gera um høgtíðir og tílíkt.



*Fabrikkin í Rættará hevði eitt fjølbroytt virksemi. Her arbeiddu Johan og pápi hansara Albert*

## Eisini bakarí, bomm og rabarbur

Eina tíð var bakarí í fabrikkini hjá Østrøm, sum Valdemar Lützen átti. Andrias í Horni, sum hevði lært til bakara hjá Restorff á Áarvegnum, bakaði har eina tíð, áðrenn hann sjálvur bygdi sethús og bakarí í Bø, núverandi Bøgøtu.

Eisini hevði Knud Lambaa heilsølu og agentur í norðasta partinum av fabrikkini oman móti Vestaruvág. Lúka bleiv sett í múrin oman móti brúnni, so vørurnar kundu fáast inn og út tann vegin.

Jens Simonsen, vanliga nevndur Gøtu Jens, fór saman við Knút Lützen, beiggja Valdemar, í holt við at gera bomm á fabrikkini. Hetta man hava verið umleið 1920. Knút fekk helvtina av fabrikkini í sín part, meðan Valdemar fekk hina helvtina eftir pápan Jacob Lützen. Knút Lützen sigldi sum ungur.

Eg var eisini eitt ár á bommvirkinum. Har dámdi mær væl. Hetta var tó ikki fyrst og fremst, tí mær dámar so væl søtt! Tað var ein danskari sum hevði "sukurvøruhúsið", sum tað varð kallað. Vit gjørdu marsipan burturúr eplum og mandilessensi. Síðan vórðu tilsettir allir møguligit litir, so tað var eitt rættiligt farvuspæl. Bommini vóru gjørd burtur úr sukri. So vórðu litir settir til, og hetta var eisini eitt farvuspæl.

Á fabrikkini hevur verið nógv ymiskt virksemi. Eina tíð aftaná kríggið gjørdu teir rabarbusúltutoy. Har stóðu nógv konufólk og skóru rabarbur, sum vóru keyptar frá fólki. Ein stórur pottur var og sukur varð nógv brúkt. Hettar arbeiði vardi í nøkur ár.

## Túrur til Velbastaðar

Tá eg var 14 ár kom Sámal í Smiðjustovu til mín. Hann var formaður hjá Lützen, har teir eisini høvdu ísvirki. Sámal spurdi meg, um eg vildi fara ein túr til Velbastaðar við agni. Eg skuldi fáa tað væl betalt. Agnið skuldi út í Hest, men teir skuldu liggja fyri mær á Velbastað við báti og taka tað. Eg minnist, at eg fór avstað klokkan 12, og tá eg var aftur í túninum slóg kirkjuklokkan tvey. Tá hevði eg verið tvørtur um Reynið og niðri í støðni á Velbastað. Førningurin var einar 15 sildir. Eg fekk tvær krónur fyri tað, og hetta var óført. Tað var nógv fyri ein ungan drong tá í tíðini. Sildin kom inni frá Skálafjørðinum, har hon var fiskað við gørnum. Valdemar Lützen keypti sild til íshúsið hjá sær.



*Fiskaturking var ein týdningarmikil vinna, tá ið Johan var ungur, eisini í Havn. Her fekk Johan eisini nakrar krónur til heimið*

## Ísvirkið

Her var eisini eitt annað jobb hjá mær. Sum nevnt kom pápi til skaða, og byrjaði so smátt at arbeiða aftur. Sámal í Smiðjustovu bað hann koma at arbeiða á ísvirkinum.

Tá plagdi eg at hjálpa pápa at fylla pannurnar við vatni, sum fyrst varð fryst og síðan knúst til ís. Hetta var ofta um kvøldi. Framleiðslan var bæði nátt og dag.

Tað var nógv brúk fyri ísi undir krígnum, tá flutningur av ísfiski til Bretlands var okkara høvuðsvinna. Tað bleiv arbeitt alt samdøgrið. Hetta var eitt sjálvstøðugt felag – »Ís og konserves«. Fiskacentralurin kom síðst í 1940-unum. Teir kundu koyra ísin beinleiðis umborð á skipini, meðan tað hjá Valdemar skuldi koyrast við bili til skipini. Tað bleiv ov dýrt, og tí varð givist við at framleiða ís á fabrikkini, eftir at Fiskacentralurin kom. Tá í tíðini vóru ongar frystiboksir sum í dag, so frystigoymslurnar á fabrikkini vóru nógv nýttar av havnarfólki at goyma kjøt og annað í, og helt hetta fram til í 50-unum.

Tá komu eisini deksbátar við tvøsti frá hvalastøðini við Áir. Tað varð fryst á fabrikkini, helst til minkafóður.

Teir høvdu ju nógv virksemi. Teir høvdu eisini eina konservesfabrikk, og var hetta virksemi heilt frá byrjan av undanfarnu øld.

## Dampdrivin maskina

Sum nevnt var virksemið hjá Valdemar rættuliga framkomið. Fabrikkin hevði sín egna motor. Tann fyrsti motorurin, ið var dampdrivin, var um 50 hestar. Hann dreiv kompressarar, valsir og kvørnir og annað mangt á fabrikkini. Motorurin bleiv skiftur út við motorin á gamla meiaríbátinum Tróndi. Seinni fekst dieselmotorur.

Fyri at økja um drívmegina hjá dampmaskinuni varð eitt øki keypt norðanfyri Rættará, har ein brunnur varð bygdur, og vatnið hiðani kom at hjálpa til at dríva maskinuna.

## Lønin ein slikkipinnur

Tá ið eg var 15 ár fekk eg 20 oyru um tíman í fiskaarbeiði, og seinast í 30-unum var full arbeiðsmannaløn ikki komin til ein króna. Tá fekk konufólkið 30 oyru um tíman.

Eg veit, at teir sum gjørdu fiskastykkini, Essa og Poul á Kirkjuveg, fingu 68 oyru um tíman í 1935. Men tað var bara so lítið arbeiði hjá fólki at fáa.

Eg gekk í fisk uppi á Hálsi, tá gekk eg í skúla. Einasta eg fekk var ein slikkipinnur hvønn fríggjadag. Lønin annars fór beinleiðis til foreldrini. Tað var tað vanliga tá í tíðini, tá øll máttu spaða til húsarhaldið.

Lønin var sum sagt 20 oyru um tíman, og ein sodavatn kostaði 30 oyru, so tað sigur nakað um lutfallið millum lønir og prísir.

## Ørindadrongur í Smæruni

Men so fekk eg arbeiði í Smæruni uppi á Abbatrøð. Eg hevði ikki fylt